

Ben Arabo, stjóri í Atlantic Petroleum. Mynd: Jógvan H. Gardar

# Atlantic Petroleum framleiddi í 1452 føt av oljulíkum um dagin

**Jógvan Hugo Gardar**

04.11.2015 - 23:35

Oljan.fo

Atlantic Petroleum boðar frá at í oktober, so hevur fyritøkan framleitt 45.000 føt av oljulíkum, svarandi til 1452 føt av oljulíkum um dagin, á økjunum Chestnut, Ettrick og Blackbird. Í september var framleiðslan 33.000 føt, ella í meðal 1100 føt um dagin.

Fyritøkan sigur at tey nú hava mett um samlaðu framleiðsluna fyri árið 2015, og mett verður at Atlantic Petroelum kemur at framleiða 495.000 føt av oljulíkum í ár, ella 1356 føt av oljulíkum um dagin. Tað er nakað minni enn fyrra metingin sum segði at framleiðslan kom at liggja um 520.000 føt av oljulíkum, svarandi til 1420 føt um dagin.

Atlantic Petroleum eigur í løtuni í 34 olju- og gassloyvum í bretskum, írskum og norskum sjógvi. Í løtuni er framleiðsla á teimum trimum Chestnut, Ettrick og Blackbird. Harafturat er eitt loyvi har ætlanin er at byrja framleiðsluna í 2016.